# John Johannesen hevur ikki uppiborið sín sess

HERGEIR STAKSBERG



Eg havi fyrr skrivað til John Johannesen, har eg segði, at eg fór at fylgja honum og hansara val lyftum víðvíkjandi tónleiki. Í mun til John Johanessen, so havi eg hildið orð.

Tað er onki, sum er so irriterandi og respektleyst, sum tá maktgreðingar útnytta naivitetin hjá fólki, so teir sleppa at valdinum. Eitt gott dømi upp á hetta fyribrigdi er John Johanessen. Hann lovaði, at hann skuldi vera tingsins rødd hjá tónleikinum, men hóast sín unga aldur, so tykist tað sum at John líður av alzheimers, tí so skjótt hann slapp at valdinum, so sveik minnið hjá manninum.

Lat okkum líka uppfríska minnið hja John: »Tá Javnaðarflokkurin aftur tekur við landsins leiðslu verður ein tónlistagrunnur skipaður við 5 mió til at menna tónlistina bæði sum lista- og vinnugrein... um tú vilt stuðla hesi ætlan, so set X við John Johannessen, Javnaðarflokkurin«, orðarætt siterað av heimasíðuni hjá Javnaðarflokkinum.

Er tað okkurt, sum eg ikki havi fingið við, ella er reglubrotið omanfyri ikki sjálv definitiónin upp á eitt brotið lyfti?

**Timburmaðurin John Johannessen**

Hetta svarar til, at eg skal byggja mær eini hús. Eg seti eina lýsing í bløðini, har eg seti nøkur krøv til tann, sum skal byggja míni hús. Eina viku seinni, so bjóðar John seg fram. Hann skal nokk byggja húsini, men tá tvey ár eru liðin, so hevur John framvegis onki gjørt, hóast hann lovaði, at hann nokk skuldi byggja húsini. Samstundis sum hann onki hevur gjørt, so havi eg goldið honum fulla løn í tvey ár. John hevur fingið sær leiklutin sum snúltari. Hini arbeiða, og John etur burturav.

**Niðurstøðan viðvíkjandi arbeiðsinnsatsinum hjá John**

Tíðin hevur prógvað, at tú ikki megnar at røkja títt starv. Tað er onki samsvar millum orð og handling. Tú ert ikki til at stóla uppá, hevur svikið tínar veljarar og hildið føroyskt tónleikalív fyri spott í áravís. Tíðin er komin, har tú leggur kongin og letur nýtt lív sleppa framat.

Hervið er bólturin á tíni hálvu. Nú hevur tú møguleikan at vísa tínar dygdir og vísa á, at mín niðurstøða er skeiv.

# Dómur Guds yvir heimin

HARDI BECH

Tunaði meg inn á Lindina eitt kvøldið og kom fram á eina sending, ið eg ikki kann minnast navnið á, men orðini ið har fullu teir fáu minuttirnar, stendur enn fast í minninum. Tað bleiv tosað um fíggjarstøðuna í USA og um tað sokallaðu avkristnanina, sum tað so fínt eitur, hóast tað er eitt fullkomiliga óbibilskt orð, og sum nærum er ógjørligt at tulka, so verður tað javnan havt á lofti og hálovað av mongum.

Í sendingini kom fram, at fíggjarkreppan var íkomin eina av gudloysi og ólýdni móti Guds boðum og fylgjan av hesum var, at amerikuíbúgvar arvaðu hesa skuldina vegna synd og ólýdni sítt. Um hetta er sannleikin, so er illa statt hjá amerikuíbúgvum, tí so verða teir harðari raktir av Guds hond enn aðrar tjóðir.

Haldið ikki sjálvur at hetta argumentið heldur, mest tí at fíggjarkreppur hava altíð verið og fara altíð at koma so leingi heisin heimur stendur, og so leingi tað verður keypt og selt og fíggjarhjólini í heiminum mala.

Men, sannlíkindini eru fyri, at hetta væl kann verða tann síðsta kreppan av sínum slag, tí givið er, at heimurin er vælvitandi um vandarnir, ið lúrað fyri framman. Um ein fylgir við í heimspolitikki ella lesur bíbliuna, so er lítil vón fyri, at hesin hart kroysti vesturheimurin hevur langa livitíð.

Amerikanar hava síðstu 100 árini verið ímyndin av vesturheiminum, sum ein "sokallaður" stóribeiggi, ið hevur bjargað neyðars Europa frá kúgan og hevur Europa við hjálp frá USA, varðveitt fríheitina. Soleiðis hava USA verið fremstu stríðsmenn fyri frælsishugsjónini og eru ímyndin av demokrati. Men nú tykist lítið um USA í heimspolitikki og vælhugsandi er at USA kemur møguliga at trekkja seg eisini herðnaðarliga næstu árini.

Um ein "kristin" ynskir at verða so harður og dømandi viðvíkjandi USA at Gud straffar teir fram um allar aðrar tjóðir, so má ein eisini verða objektivur, tí at um USA er so gudleyst og skal bøta so hart longu nú, hvat so við teimum avrikunum, ið teir hava framt, t.d so brúkti Ísraels Gud, USA til at hjálpa fólkið Guds aftur til sítt egna land sum við lyftið er Ísrael.

Alt hetta tosið um kristnan og avkristnan, er eitt religiøst og menniskjauppugsað hugtak, ið tú ongastaðni finnur í Skriftini frá Gudi. Tjóðir kunnu ikki verða ella blíva kristnar, ei heldur kann ein tjóð avkristnast. Dómur Guds, Guds fullkomni og rættvísi dómur er goymdur Degi Harrans.

Í Ezekiel kap. 30 og vers 3 »Tí nær er dagurin, ja, nær er dagur Harrans; DAGUR við skýggjum, dómstíð skal hann vera tjóðunum. Um Harrin Gud skuldi dømt og gjørt upp við syndina her og nú, so hevði Orð Guds ( Ezk. kap.30 og v.3) ikki verið eftirfarandi. Tí hevði Harrin gripið inn í støðu tjóðanna og fólksins so hevði ongin sloppið undan. So spurningurin má tí verða. Hevði TÚ viljað, at Harrin gjørdi upp í tínum lívi beint nú og dømt syndin í tær og rundanum teg??

Helst ikki, og her kemur frelsuboðskapurin inn, at tann ið trýr á Sonin kemur ikki til dóms, men gongur yvirum frá deyðanum til LÍVIÐ, og lívið er Jesus Kristus (Jóhs kap.14v6) Dómur merkir deyði og deyði merkir skilnaður frá Gudi. So ein kann ikki bæði verða frelstur og dømdur (livandi/deyður) somu tíð.

Jesus sigur í Jóhs. evangelium kap.16 vers.11 at høvdingin yvir hesum heimi ER dømdur, og tí kann heimurin ið sjálvum sær ikki frelsast, og høvdingin yvir hesum heimi er Antikrist og Antikrist kann ikki frelsast undan dómi Guds, tí hann er longu dømdur, tí Harrin Gud dømdi syndina og heimin í Edens urtagarðið og staðfesti dómin á Golgata krossi, Tá vísti Jesus seg sum sigursharra og vann okkum (menniskjum) eina æviga endurloysing í blóði sínum. Tí er Guds Sonarblóð einasta bjarging ið kann frelsa út úr hesum dømda heimi.

Dagur Harrans skal avgera lagnuna hjá USA og øllum øðrum tjóðum, og ikki ófullkomin menniskju, ið ikki enn síggja inn í fullkomnu mynd Guds.

Skal enda við einum Orðið úr Fyrra Timoteusarbrævið kap.2 frá v. 1 til 4.. »Eg áminni nú fyrst av øllum um, at bønir, ákallanir, forbønir, takkargerðir verða hildnar fyri øllum menniskjum, 2. fyri kongum og øllum, ið høgt eru sett- fyri at vit kunnu liva stilt og friðarligt lív í øllum gudsótta og siðprýði.3. Hetta er Gudi, Frelsara okkara, gott og tekkiligt, 4. Honum, sum vil, at ØLL menniskju skulu verða frelst og koma at kenna sannleikan«.

Haldi at øll bíbliutrúgvandi skuldu hildið seg til hesi orð og biðið fyri mannaættindum og yvirlatið dómin til tann, ið er tann einasti, ið er førur fyri at døma rættvísan dóm.

# Bjørn bluffar um pensjónir

HANS PAULI STRØM
løgtingsmaður



Stuttligt at Bjørn Kalsø er blivin so íðin politiskur debattørur, tí soleiðis var ikki tey fýra árini hann sat sum landsstýrismaður í fiskivinnumálum í fyrru ABC-samgonguni. Nú í seinastuni hevur hann serliga átikið sær at rættleiða meg í fjølmiðlunum, og tað er sjálvsagt í lagi.

Tó haldi eg at hann fer út um siðiligt mark í sínum seinasta lesarabrævi, sum ikki var annað enn skitið persónligt briksl, og leggi tí ikki í svara tí aftur – burtursæð frá tí hann sigur um pensjónirnar.

Tí tað er ein óreinligigur veruleiki, at pensjónirnar, við fólkapensjón, viðbót til ávísar pensjonistar og Samhaldsfasta hækkaðu úr 7.800 til 10.300 kr/mán fyri stakan pensjonist og úr 12.370 til 16.970 kr/mán fyri pensjonistahjún, uttan aðrar munandi inntøkur. Hetta hendi í tíðarskeiðinum 2004-08.

Síðani tá er bert ein broyting hend: nevnliga at eftir uppskotið frá Rósu Samuelsen varð reguleringin av allari fyritíðarpensjónini, eins og viðbótin í fólkapensjónini minkað úr 4 niður í 3%.

Av tí at viðbótin bert er ein góður triðingur av fólkapensjónini, og grunduppphæddin, sum er knappliga 2/3 av fólkapensjónini, als ikki verður reguleráð, so merkir ein minking av reguleringini av viðbótini úr 4 niður í 3%, at reguleringin av samlaðu fólkapensjónini minkar úr 1,7 til 1,2%.

At framstilla tað sum ein bata, er tað reina bluff.

# Tórshavnar Musikkskúli vil ikki hava mín son

SÚNFRÍÐ GIEHM

Ringdi til Musikkskúlan í morgun (sum eg havi gjørt 100 ferðir áður), og fekk at vita, at nú er sonurin nr. 107 á bíðilista. Hann var skrivaður upp fyrst í 2005, og hevur sostatt staðið á bíðilista í næstan 5 ár. Á musikkskúlanum tora tey einki at siga um útlitini. So eg veit í skrivandi stund ikki, um hann nakrantíð fer at sleppa inn.

Sonurin, sum er 10 ár, hevur havt ein frálíka dugnaligan ungan mann sum privatlærara í gittarspæli. Nú hevur lærarin hjá honum valt at fara út í heim at útbúgva seg víðari innan tónleik, og tað hevur ikki eydnast okkum at finna ein nýggjan.

Havi skilt, at nógv foreldur skriva teirra børn upp á allar hugsandi listar, longu meðan mamma og barn enn liggja á føðideildini. Tað er mær ein gáta, hvussu hesi fólk kunnu vita, at akkurát hetta lítla barnið fer at tíma at spæla klaver ella trummur ella okkurt heilt triðja. Eg eri tíverri ikki vælsignað við tí gávu, tað man vera at síggja inn í framtíðina. Skrivaði hann upp, tá eg varnaðist, at hann hevur bæði árræði, hug og eitt viðføtt talent, men tað var also 5 ár ov seint. Kanska skuldi hetta við tilmelding til musikkskúlan verið broytt, soleiðis at børnini kunnu verða skrivaði upp, tá tey eru 5 kanska 6 ár. Tá hava foreldrini ein møguleika fyri at vita, um barnið vísir áhuga fyri hesum ella hasum. Og listarnir hjá musikkskúlanum verða automatiskt styttri.

Valdi til seinasta val at seta kross fyri einum øðrum valevni, enn eg annars plagdi at gera. Tí hesin politikkarin tosaði so sannførandi um, at hann fór at arbeiða hart fyri, at tann nýggi musikkskúlin fór at standa liðugur innan fyri tvey ár – eg breyt gomul persónlig mørk, og valdi hann. So nú má eg spyrja Heðin Mortensen: Hvussu gongur við musikkskúlanum? Verður hann liðugur um eitt gott ár?? Kennir tú nakran privatlærara vit kundu ringt til?? Og vil kommunan gjalda sín part av undirvísingini?

Og til seinast Heðin: Eru øll ikki líka fyri lógini her í kommununi, tá øll gjalda skatt, men bert summi sleppa at brúka tilboðini, sum kommunan hevur??